Fuglafjarðar Kommuna

# Starv sum bókavørður á Fuglafjarðar bókasavni

Starvið sum bókavørður á Fuglafjarðar Bókasavni verður hervið lýst leyst til setan tann 01. mars 2011 ella skjótast eftir hetta.

**Starvið:**
Tú kemur í starvinum at hava leiðsluna av Bókasavninum, har tú kemur at arbeiða við øllum vanligum bókavarðaarbeiði í tøttum samstarvi við Kunningarstovuna í Fuglafirði, sum heldur til í somu húsum sum bókasavnið.

**Førleikakrøv:**
Til starvið krevst útbúgving sum bókavørður, men um so verður, at eingin umsøkjari er til starvið við hesi útbúgving, so kann annar umsøkjari verða settur í 1 ára tíðaravmarkað starv. Tú skal hava viðkomandi førleika í enskum máli í talu og skrift, somuleiðis sum tú skal duga væl at orða teg bæði munnliga og skrivliga, hava teldukunnleika og kunnleika til nýmótans leiðsluamboð.

**Vit bjóða tær:**
Eitt spennandi og sjálvstøðugt starv, har túført møguleika fyri at menna bókasavnið.

**Setanartreytir:**
Starvið er fulltíðarstarv og verður lønt sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Hevur tú áhuga**
so ert tú vælkomin at senda skrivliga umsókn saman við prógvum og møguligum CV og viðmælum til Fuglafjarðar býráð, Ennivegur 38, 530 Fuglafjørður, og skal henda verða ráðnum í hendi í seinasta lagi týsdaginn tann 08. februar 2011 kl. 16.00.

**Nærri upplýsningar**
fáast við at venda sær til Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara á telefon 737700.

Býráðið skilar sær rætt til at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.

*Fuglafjørður, tann 20. januar 2011*

**Fuglafjarðar býráð**

INPACT

# BÓKHALDARI

Vit sóknast eftir einum royndum bókhaldara til bókhaldsdeild okkara skjótast gjørligt.

Fyri at røkja starvið krevst, at viðkomandi, sum verður settur í starv, dugir at arbeiða sjálvstøðugt og annars hevur evni at seta seg inn í viðurskiftini hjá ymsum fyritøkum.

Flestu bókhaldskundarnir koma við bókhaldsskjølunum hvønn ársfjórðing. Til tíðir kann vera neyðugt at arbeiða yvir, og vænta vit, at tann ið verður settur í starv, er sinnaður at taka neyðugu tøkini tá ástendur.

Hóast starvið er sjálvstøðugt, kemur tú í gerandisdegnum at arbeiða saman við bæði kundum og grannskoðarunum á virkinum.

Starvstreytirnar verða ásettar í avtalu millum tann, sum verður settur og leiðslu felagsins.

Tey, ið ætla at søkja, skulu senda skrivliga umsókn við prógvum og møguligum ummælum innan 10. februar 2011.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Jógvan Amonson.

**Sp/f Grannskoðaravirkið INPACT**
Løggilt grannskoðaravirki
R. C. Effersøesgøta 26
Postrúm 191, FR-110 Tórshavn
Tlf. +298 314700 -Fax. +298 313815
Teldupostur: inpact@inpact.fo
Heimasíða: www.inpact.fo

# Føroya Heimavirkisfelag

Boðar hervið frá, at Norðurlendska Heimavirkislegan í 2011 verður í døgunum 3.-9. juli í Tingeyri á Vestfirðum í Íslandi.

Kunning um virksemi og skrá annars fæst á heimasíðu felagsins www.craft.fo og eisini í handlinum í Niels Ninsensgøtu 35.

Eisini hava heimavirkisfeløgini kring landið fingið alt tilfarið.

Legan er fyri øll við áhuga fyri heimavirkisarbeiði og allar aldursbólkar.

Hóast Tingeyri einans hevur 280 íbugvar, ert tey von at taka stór tøk saman.
Tó skal gerast vart við, at luttakarar úr hinum Norðurlondunum hava frammihjáarætt til 1. februar, at tekna seg fram um Íslendsku luttakararnar

Sinasta freist at boða frá luttøku er 1. apríl 2011 til Islandsleir2011@gmail.com

**Føroya Heimavirkisfelag**
J. Patursonargøta 24 Postrúm 1159. Telefon 522686.
Teldupostur craft@craft.fo. Heimasíða; WWW.craft.fo
Handilin í Niels Finsengøtu 35 , telefon 508769
Opið er millum 14 og 17.30, leygardag 10 og 14.00

Føroya heimavirkisfelag

ADVOKATSKRIVSTOVAN

# TVINGSILS-SØLA

Týsdagin tann 22. februar 2011, kl. 09.30, verður á Dómaraskrivstovuni í rættarsali IV, undir Glaðsheyggi 14, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir matr. nr. 1368, Klaksvík.
Ognin er ein partur av samanbygdum sethúsum í trimum hæddum til støddar uml. 80 m2 hvør hæddin. Grundøkið er uppá 105 m2.
**Húsini eru innrættaði soleiðis:**
Stovuhædd: Inngongd, wc, tvey kømur, køkur, stova, kamar við útgongd til altan.
**Loftshædd:** Køkur, baðiverilsi, tvey kømur og stova.
Í kjallarahæddini er eitt neyst við fýrrúmi umframt eitt opið rátt rúm.
Húsini eru ikki viðlíkahildin seinastu mongu árini og krevja munandi ábøtur.
Sølan er umbiðin av Óla Jákupi Kristoffersen, advokati, Frúutrø 4, Tórshavn, tlf. 35 33 35, e-mail ojk@jura.fo (j. nr. 20100983), ið kann geva nærri upplýsingar og útflýggja tvingsilssølu-uppstilling, og sum nærri avtala kann gerast við, um ynskt verður at síggja ognina.

Frúutrøð 4 · Postboks 6
FO-110 Tórshavn
Tel 35 33 35 · Fax: 35 33 36
www.jura.fo




## Hevur tú HUND?

**So burdi tú eisini havt SKYTTENs SPECIAL**

SKYTTENS hunda- og kettufóður er kvalitetsfóður, framleitt í Danmark síðan 1970.

**SPECIAL** (20 kg)
Turrfóður til vaksnar hundar. Við omega-3 og omega-6 feittsýrum, ið geva ein blankan pels. Er sera gott til hundar við húð- og pelstrupulleikum og til eldri hundar.

Fyri posan..... **kr. 450,-**




**Bilegg beinleiðis á netinum**
www.fodursolan.com
info@fodursolan.com
Ókeypis útkoyring í Havn


**Fjeppari? Les um ítrótt í Sosialinum**



# Aðalfundur

Frá Bátafelagnum á Bakka.
Árligi aðalfundurin verður í hølum felagsins,
sunnudagin 6. februar kl. 16.00.
Skrá sambart løg felagsins.
Heilsan Nevndin




SKÚLAFLOKKAR · ÍTRÓTTARFELØG · PENSJÓNISTAR · ARBEIÐSPLÁSS · BINDIKLUBBAR · GONGUFELØG

## Vælkomin til Íslands



Skipað verður fyri ferðum kring Ísland, m.a. til Gullfoss, Geysir, Tingvellir og Bláa Lón.

*TOSAÐ VERÐUR FØROYSKT*

**Bæði stórir og smáir bussar** Tel. +354 861 3426 · davidsam@simnet.is
**Davíð Samúelsson,** Góðkendur ferðaleiðari


**Ítróttarsosialurin altíð við har tað hendir**

